tíðindablaðið **sosialurin**
Internet: www.sosialurin.fo

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov

Marknaðardeild: Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
Blaðfólk: Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakkstein, Niclas Johannesen
Yngd: Jákup Mørk

Myndamenn: Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
Útgevari, uppseting: Sp/f Sosialurin
Bústaður: Argjavegur 26, Argir

Postadr: Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Telefon: 311820
Telefax. 314720
e-mail: post@sosialurin.fo
Lýsingar: lysing@sosialurin.fo
Prent: Sosialurin

Startskot til stóra og nýggja avbjóðing

Oddagrein

HÓSDAGUR tann 17. februar ár 2000 kann koma at gerast eitt týðandi vegamót í føroyskari søgu - uppá gott og ilt. Henda dag - og tað er í dag - letur 1. útbjóðing til oljuleiting á føroyska landgrunninum alment upp. Í dag verður tað gjørt kunnugt um alla verðina, at Føroyar eru tilreiðar at gerast oljutjóð. Porturið, sum nú í fleiri ár, hevur staðið á glopp, er nú víðopið. Tað stendur nú altjóða oljuheiminum - vil hann góðtaka føroysku treytirnar - at fara undir leiting eftir olju og gassi í einum av teimum seinastu økjunum í heiminum, har tað ikki hevur verið leitað áður, og sum verður mett at kunna goyma stórar nøgdir av olju og gassi. Loksins er upprunnin tann dagur, sum mong hava bíðið við spenningi eftir, men sum uppaftur onnur hava borið ótta fyri. Tað er greitt, at ein olja- og gassvinna kann gerast tað nógv eftirspurda beinið, sum okkara búskapur kann standa á saman við fiski- og alivinnuni. Tað er eisini greitt, at ein slík nýggj vinna er ein stór avbjóðing fyri eina so lítla tjóð sum okkara og hon setir stór krøv til okkum øll og ikki minst politikararnar.

HVØR mundi annars fyri bert fáum árum síðani hugsað, at oljufeløg fóru undir at bora eftir olju við Føroyar? Neyvan mundi táverandi jarðfrøðingurin Jóannes Rasmussen, sáli geva tá ímynda sær, at oljufeløg fóru at vísa undirgrund okkara so stóran ans sum veruleikin er. Kortini metti hann longu fyri mongum árum síðani, at møguleikar vóru fyri at finna olju og ikki minst júst har feløgini nú seta ljóskastaran á. Men hann helt slíka leiting liggja langt, langt frammí í tíðini, tí táverandi tøknifrøðin megnaði ikki leiting í so djúpum og veðurbardum vatni. Men longu um somu tíð sum oljufeløg vístu bæði norska og bretska landgrunninum ans vendu tey eisini eyguni hendavegin. Onkrar seismiskar kanningar vórðu gjørdar, og í eini skuffu í Tinganesi rúgvaðu seg upp umsóknir frá oljufeløgum, sum vildu sleppa í gongd. Føroyskir myndugleikar gjørdu tó greitt, at áðrenn nakað loyvi bleiv givið, skuldi undirgrundin fyrst á føroyskar hendur. Og tá hetta so bráddliga hendi í 1992 gekk tað so stig fyri stig. Seismiskar kanningar av øllum Føroyaøkinum, ráðleggingarnevndir, arbeiðsbólkar, lógaruppskot og loksins løgtingslóg um útbjóðing. Hóast tað tók sína tíð at fáa avtalu við bretar um markið, so hevur kortini gingið sum fótur í hosu.

TAÐ er greitt, at vit tosa um eina áhugaverda og spennandi framtíð, sum eisini fer at bera vandamál í sær. Vit hava tó fyrimunin at kunna læra av royndunum hjá øðrum, og vit kunnu útbúgva okkara egna fólk í góðari tíð. Hetta skuldi kunnað minkað um tær negativu síður, sum fleiri bera ótta fyri, at júst ein ógvuslig oljuvinna kann hava við sær. Vit fara inn í eitt tíðarskeið, ið kann fáa stóra týdning fyri komandi ættarlið. Latið okkum brúka tíðina, vitanina og kreftirnar rætt. Latið okkum hyggja frameftir og brúka okkara sunna fornuft og arbeiðssemi skilagott.

Sosialurin

Viðmerking:

Eingin eigur at fáa munnkurv

— Vit halda fast um okkara grundlógartryggjaða rætt til í skrift og talu at geva okkara hugsan til kennar. Tí mást tú eisini læra teg at liva við, at hvørki andstøðan ella nakar annar kann fáa munnkurv í hesum stóra máli, sigur Jóannes Eidesgaard m. a. í svari til Høgna Hoydal

Góði Høgni!

Gamalt er at siga, at tá politikkarar fara at senda brøv sínámillum, tá syngur samstarvið upp á síðsta vers. Hvussu nú fer at verða í okkara føri, tað vil so tíðin vísa, men neyvan nakrantíð áður hevur ein stórur flokkur sum Javnaðarflokkurin víst einum ungum, óroyndum politikkara úr øðrum flokki slíkt álit, sum vit gjørdu, tá vit eftir valið peikaðu á teg sum samráðingarleiðara.

Men nógv vatn er runnið í havið síðan tann dagin á vári 1998.

Tvær høvuðsákærur

Staddur á Tvøroyri frætti eg í útvarpinum sunnukvøldið, at eg hevði fingið eitt brævi frá tær, sum tú eisini hevði sent fjølmiðlunum.

Høvuðsákærur tínar eru tvinnar. Onnur, at eg havi funnist at demokratisku mannagongdini í fullveldismálinum og hin, at eg skal hava sagt, at tit ikki hava meiriluta í løgtinginum aftan fyri tykkum í sama máli.

Av hesum báðum er tann seinna sera tyngjandi, meðan tann fyrra altíð vil verða ein spurningur um, hvørji eygu meta um málið. Men lat okkum taka ta seinnu fyrst.

Hóast tú fekst at vita í útvarpinum á middegi mánadagin, at tað var ein miskiljing, sum var hend á Ritzau, sum lá til grund fyri tíðindunum um vikuskiftið, so stendur tú fast við hvassligu atfinningar tínar ímóti mær fyri at koma við álvarsligum og ósonnum pástandum, sum eg tó hvørki eigi lut ella deil í.

Ákæran er afturvíst. Randi Mohr frá Ritzau er komin við eini umbering til mín, og hevur tíðindastovan alment boðað frá, at teir hava mistikið seg. Hetta var tó ikki nóg mikið til, at tú tók ákærurnar ímóti mær aftur, og nú letur tú haraftrat bløðinin prenta brævið.

Heldur fast um ósannindi

Har vanligt hevði verið at sagt, at har fór eg skeivur og legði teg undir nakað av óróttum, so er tað líkt til, at tað nú herðir stríðið, og tí má okkurt heilt annað búgva undir. Eg kann liva uttan eina umbering frá tær fyri hasar ákærurnar, men eg kann illa liva við, at leiðandi politikkari her á landi heldur fast um ósannindini.

Tað er líkt til, at málið ikki longur er at fáa sannleikan fram, men er knappliga heldur vorðið eitt mál í sær sjálvum.

Tá tað snýr seg um demokratisku mannagongdirnar í fullveldismálinum, nýtist tær ikki at endurtaka alla mannagongdina síðan valið í 1998. Ein av atfinningum mínum um uppskot Sambandsfloksin um eina leiðbeinandi fólkaatkvøðu var júst tann, at landsstýrið hevði mandat til at fara undir samráðingar við ríkisstjórnina, so leingi sum reglurnar í okkara stýrisskipan um at ráðføra seg við uttanlandsnevndina vórðu fylgdar. Formellu reglurnar vóru í lagi. Tískil tóku vit í Javnaðarflokkinum heldur ikki undir við uppskotinum hjá Sambandsflokkinum.

Men atfinningar mínar hava verið vendar ímóti gongdini seinastu dagarnar í samband við ráðføringina við uttanlandsnevndina.

Upplýsing er týðandi lutur

Vit fingu eitt upprit, sum var stemplað í trúnaði. Við bit og slit fingu vit loyvi til at leggja uppritið fyri tingmanningarnar, men ikki út um tað. T.v..s. at vit fáa ikki brúkt teir eksternu ráðgevararnar, sum vit vanliga brúka til slík mál bæði innan løgfrøðina og innan búskaparfrøðina.

Týðandi liður í einari demokratiskari tilgongd er atgongdin til allar upplýsingar og øll viðkomandi skjøl, men sanniliga eisini atgongdin til sakkunnleikan.

Tit hava boðað frá, at eitt uppskot til ein sáttmála verður lagt fyri stjórnina um ein lítlan mánað, og henda vildu vit sum limir í uttanlandsnevndini síggja. Sambært fyrstu útsagnum løgmans, so skuldi heldur ikki uttanlandsnevndin síggja uppskotið til sáttmála.

Tað er landsstýrið, sum alment hevur fráboðað nevnda sáttmálauppskot, og tað var landstýrið, sum boðaði frá, at eingin uttan landsstýrið og danska stjórnin skuldi síggja skjalið.

Einki skuldi fram

Á seinasta fundi í uttanlandsnevndini gjørdi ein meiriluti av, at vit vildu hava løgmann og teg á fund fyri at fáa eina frágreiðing um, hví sáttmálauppskotið skal dyljast sum mansmorð.

Men nú siga bæði løgmaður og tú nakað heilt annað. Fyri tað fyrsta at einki uppskot enn er gjørt til nakran sáttmála, og tað ljóðar í sjálvum sær rættiliga løgið, men haraftrat, at sjálvandi skal uttanlandsnevndin síggja uppskotið til sáttmála, áðrenn farið verður til samráðingar.

So vit siggja, at ætlan landsstýrisins var, at einki skuldi fram, men eftir trýsti frá uttanlandsnevndini, so hava tit verið noyddir til at givið tykkum. Upprunaliga ætlaðu tit, at bert uttanlandsnevndalimirnir skuldu síggja uppritið, men nú fáa tingmenn eisini høvið — upprunaliga ætlaðu tit, at eingin skuldi síggja sáttmálauppskotið, men nú sleppur eisini uttanlandsnevndin at síggja hann.

Men framvegis situr føroyingurin og veit hvørki út ella inn um tað, sum skal fara fram. Einasta hann hoyrir er, at løgtingsmenn mugu brúka allar snildir fyri at fáa atgongd til neyðugu skjølini, hvussu kann hann tá rokna við at síggja nakað. So koma tit við enn einari royndi at slætta sjógvin — uppritið verður almannakunngjørt, tá nevndin er liðug við viðgerðina.

Kann ikki samanberast

At gera samanberingar við onnur mál, sum eitt nú markið við Bretland, er púrasta burturvið. Tá stóð øll tjóðin sum ein maður, og um markið var ein kvartfjórðing syðri ella norðari á hevði neyvan givið nøkrum andvekur. Men í hesum máli stendur tjóðin í minsta lagi í tveimum portum. Tit mugu læra tykkum at liva við, at kanska ein stórur helmingur av tjóðina ikki tekur undir við ætlan tykkara.

Eg havi ongan hug at gera viðmerkingar til tað, sum er farið fram fyri 30 til 50 árum síðani, tí eg dugi snøgt sagt ikki at síggja nakað endamál við tí. Og eg vænti, at okkurt høvið verður til tað um stutta tíð, og tá kunnu vit so taka alt við.

Viðvíkjandi kreppusamráðingunum í 90´unum, so vóru tá, sum tú eisini sigur, næstan undantaksstøður galdandi. Landdstýrið varð fleiri ferðir boðsent yvir eina nátt til samráðingar, tí mangan vóru bert tímar um at gera, at ikki alt peningakervið fór á heysin. Fyri rættleikans skuld skal her viðmerkjast, at allar hesar samráðingarloysnirnar vórðu lagdar fyri løgtingið og samtyktar. Eisini við atkvøðunum frá m.a. Tjóðveldisflokkinum, sum frá apríl 1993 og fram til sept. 1994 var í samgongu saman við m. ø. Javnaðarflokkinum. Og tá var ikki nýggja stýrisskipanin sett í gildi.

Skuldseting um landasvik

Annars var orsøkin til, at Ritzau ringdi meg upp leygarmorgunin, at teir fegnir vildu hava mína viðmerking til útsagnir tínar, um at vit nú mugu gera av hvørja síðu vit valdu, ta føroysku ella ta donsku.

Eg svaraði, at hetta var at fara út um øll sømilig mørk, tí í hesum útsagnum lá ein óbeinleiðis skuldseting um landasvik ímóti uml. 60% av veljarunum, sum var tað, sum seinasta veljarakanning vísti um tey, sum ikki tóku undir við fullveldisætlanini.

Eg haldi hvørki tú ella eg ella nakar annar skal gera av, hvørjir rættir føroyingar eru. Ì aktuella málinum, so vilja allir partar, tað eru tit og vit og allir aðrir, tað besta fyri Føroyar og føroyingar. Munurin er bert, hvussu ymiskt vit síggja, hvussu viðurskiftini skulu loysast.

Eg má eisini minna á, at alt hetta tosið um at velja síður og um rættar føroyingar er so óføroyskt, sum nakað kann verða. Hetta var og er framvegis eyðkenni hjá londnum við einflokkastýrum og einaræði, og betur var, um vit brúktu aðrar fyrimyndir.

Somuleiðis mugu vit halda fast um okkara grundlógartryggjaða rætt til í skrift og talu at geva okkara hugsan til kennar. Tí mást tú eisini læra teg at liva við, at hvørki andstøðan ella nakar annar kann fáa munnkurv í hesum stóra máli.

Vinarliga
Jóannes Eidesgaard,
løgtingsmaður

Vilt tú vera við
í Føroya fremstu KT-fyritøku?

NAVISION®
solution center

Formula.fo hevur sín uppruna afturí í 1983, tá fyrsta felagið í koncernini, P/F Petersen & Guttesen, varð stovnað.

Formula.fo selir og mennir fyrisitingarligar loysnir innan figgjarstýring og journalisering, umframt framleiðsluloysnir innan fiskivinnuna. Eisini letur Formula.fo KT-loysnir til skrivstovuna.

Formula.fo leggur stóran dent á at hava vælútbúgvið starvsfólk, við dagførdari vitan. Formula.fo hevur m.a. starvsfólk við Microsoft Certified System Engineer útbúgving, er einasta fullmannaða Navision Solution Center í Føroyum og eru vit eisini Siemens Qualified Partner.

Á Formula.fo starvast í løtuni uml. 60 fólk á ialt 1500 m², í tveimum bygningum.

Vit hava tørv á 4 forritarum til høvuðsdeild okkara í Tórshavn. Talan er um tveir forritarar til figgjarstýringsskipanina Navision Financials og tveir forritarar til skjalaskrásetingarskipanina DocuLive.

Navision Financials	DocuLive
Starvsuppgávan verður at forrita tillagingar í standard skipanini, samstundis sum givin verður tænasta/support av verandi tillagingum.	**Starvsuppgávan** verður at veita tænastu/support til DocuLive, samstundis sum tillagingar til standard skipanina skulu gerast.
Tú ert datamatikari ella hevur arbeitt eitt drúgvt tíðarskeið við bókhalds- og figgjarstýringsskipanum. Tú kannst bæði arbeiða sjálvstøðugt og saman í bólki.	**Tú ert datamatikari** ella hevur arbeitt innan SQL og Visual Basic. Aðrar viðkomandi royndir er sjálvandi ein fyrimunur. Tú kannst bæði arbeiða sjálvstøðugt og saman í bólki.
Vit kunnu bjóða tær eitt spennandi og fjøllbroytt starv, har tú ert við til at mynda tín egna arbeiðsdag, samstundis sum tú fært góðar møguleikar innan eftirútbúgving.	**Vit kunnu bjóða** tær eitt spennandi og fjøllbroytt starv, har tú ert við til at mynda tín egna arbeiðsdag, samstundis sum tú fært góðar møguleikar innan eftirútbúgving.
Løn sambært avtalu.	Løn sambært avtalu.

Umsóknin, saman við viðkomandi prógvum og skjølum, skal sendast til **formula.fo**, postboks 1078, 110 Tórshavn og skal stílast til Fróða Magnussen, ella á teldupostadressu *starv@formula.fo* innan 1. mars 2000.

Eisini ber til at ringja til okkara á tel 311115 fyri at fáa fleiri upplýsingar um omanfyrinevndu størv.

Microsoft Certified Solution Provider

formula.fo
fremst innan KT